

Gjøgnum hetta rørið streyma 750.000 tunnur ella 120 milliónir litrar á land um samdøgrið á oljuterminalinum í Sture



Tað er kostnaðarmikið hjá eldru tangaskipunum, ið ikki hava nýggjastu útgerðina, at leggja til bryggjuna á Sture terminalinum. Havnagjaldið er 450.000 krónur, men tá tey fara avstað hava tey kanska eitt lastavirði millum 200 og 300 milliónir krónur

# 120 mió. litrar av olju streyma í land um dagin

Meira enn eitt prosent av samlaðu oljuframleiðsluni í heiminum streyma dagliga inn til goymslurnar á oljuterminalinum í Sture, sum liggur 60 kilometrar í ein útnyrðing úr Bergen. Fimm risastórar oljugoymslur eru sprongdar inn í fjallið, sum hvør taka 200.000 rúmmetrar.

ORÐ OG MYNDIR: DIA

Í 1988 kundu norðmenn á fyrsta sinni føra olju úr Norðsjónum og inn til Noregs umvegis eina rørleiðing á havbotnium, ið er 28 tummar í tvørmáti og 130 kilometrar til longdar.

Oljan bleiv pumpað inn til Sture oljuterminalin frá Oseberg-sentrinum, ið umfatar oljupallarnar Oseberg A og B. Seinni eru so fleiri framleiðslupallar bundnir í rørleiðingina, so í dag tekur Sture oljuterminalurin ímóti olju frá Oseberg A, B, C og Oseberg Vest, Brage, Veslefrikk, Lillefrikk og Frøy. Tilsamans 750.000 tunnur um samdøgrið.

## Risastór tøl

Tað sigur seg sjálvt, at goymslurnar á Sture oljuterminalinum mugu vera risastórar. Tað eru tær eisini, hóast tú ikki sært tær við eygunum. Fimm goymslutangar, ið eru 33 m høgir, 19 m breiðir og 316 m langir eru sprongdir í fjallið. Hesir rúma 200.000 rúmmetrar hvør, so samlaða oljugoymlsan á Sture er 1 mió. rúmmetrar. Hetta svarar til einar 5 milliónir tunnur ella 800 milliónir litrar av olju.

Tangabátar upp til 300.000 tons kunnu leggja at teimum báðum bryggjunum hjá terminalinum, og í meðal um árið avskipar ein tangabátur um dagin. Dagin eftir at føroyska ferðalagið vitjaði á oljuterminalinum, var ein tangabátur á 300.000 tons eftir olju. Tá ið hann fór frá bryggjuni, hevði hann eitt virði áljóðandi einar 250 milliónir krónur í lastini. At so havnagjaldið var einar 200.000 krónur, tað hevði ikki so nógv at siga í slíkum samanhangi.

## Ein stýrir øllum

Alt arbeiði á Sture oljuterminalinum verður stýrt úr einum kontrollrúmi, har altíð fýra mans eru til arbeiðis. Hóast oljan streymar á land og skal inn á goymslurnar, og tvey stór tangaskip liggja við bryggjuna og taka olju umborð, so kann alt arbeiðið stýrast av einum persóni.

Teldur stýra øllum arbeiðnum og eisini samskiftinum millum oljupallarnar og oljuterminalin. Á eltalvuni í kontroll-rúminum er ein grønur avbrótari, sum ikki skal brúkast í tí og úrtíð. Verður trýst á tann knøttin, so steðgar framleiðslan á øllum oljupallunum í Norðsjónum, sum framleiða til oljuterminalin. Neyðugt er við einari góðari grundgeving, tá ið telefonirnar í kontrollrúminum stutt eftir fara at kima.

## Trygdin í hásæti

Eins og úti á oljupallunum, so er trygdin eisini í hásæti á Sture oljuterminalinum. Tað er kanska ikki so løgið, tá ið so nógv olja verður móttikin og avskipað. Eitt nú í 1996 vórðu fleiri enn 35 mió. tons ella 265 mió. tunnur avskipað.

Tá ið tangaskipini boða frá, at tey koma eftir olju, verða tey móttikin av serligum sleipibáti. Hann fylgir tangabátinum til bryggjuna og kann, um eitt nú motorurin steðgar ella róðurambóðini svíkja, steðga stóra tangaskipinum ella fáa tað beint á røttu kósina.

Oljuterminaluriun er eisini serliga væl útgjørdur við útgerð og manning, um ein oljuleki hendi á sjónum. Tveir bátar toga eina serliga gyrðing á 300 metrar út í báðum síðunum, so tamarhald beinanvegin fæst á lekanum.

## Endurvinna gass

Á umhvørvisøkinum verður eisini nógvur peningur brúktur í Sture.

Í 1996 var eitt nýtt endurvinningarverk tikið í brúk. Tá ið oljan verður pumpað umborð á tangaskipini, er ein ávís nøgd av VOC-gassum í dampinum frá oljuni. Nýggja endurvinningarverkið ger, at í dag er henda nøgd minkað við meira enn 90 prosentum. Sture oljuterminalurin er tann einasti í heiminum, ið hevur eitt slíkt verk. Kostnaðurin er 140 milliónir krónur.

Neyðugt er eisini, at tangaskipini, sum skulu ferma oljuna, hava røttu útgerðina til at endurvinna gassið úr oljudampinum. Nýggjastu tangaskipini hava hesa útgerð, meðan støðan er verri hjá teimum eldru skipunum. Tískil er tað eisini nógv dýrari hjá einum eldri tangaskipi at koma til bryggjuna í Sture. Havnagjaldið er 450.000 krónur, meðan tangaskipini við nýggjastu útgerðini sleppa við 150.000 krónum.

Statoil, Hydro, Saga, Elf, Mobil og Total eiga oljuterminalin í Sture og rørleiðingina inn frá Norðsjónum. Hydro er operatørur fyri bæði terminalin og rørleiðingina.




Ein slíkur sleipibátur fylgir hvørjum tangaskipi seinasta strekkið til Sture oljuterminalin. Hann festir seg í tangaskipið har afturi og er soleiðis ein eyka trygd, um eitthvørt óvæntað hendir við motorinum ella stýriamboðunum hjá skipinum

# Atlantsflog má flúgva til Noreg og Bretland

– Tað er bæði synd og skomm, at okkara almenna flogfelag ikki hevur flogsamband við nærmastu grannalondini, sigur vinnulívsmaðurin Johan Mortensen.

DIA MIDJORD

Oljuvinnan er av álvara farin at gera um seg í Føroyum. Hotellini eru á tremur við útlendskum oljumonnum, og føroyingar hava eisini nógv samskifti við umheimin. Eitt nú eru fleiri føroyingar farnir at útbúgva seg innan oljuvinnuna í grannalondunum.

– Okkara lítla oyggjaland er alt ov avbyrgt, um vit bert skulu hava flogsamband við Danmark, heldur vinnulívsmaðurin Johan Mortensen.

Hann vísir á, at Atlantsflog er eitt alment flogfelag og tí eigur og má finna onkra frægari loysn enn bert Danmark.

– Bretland og Noreg eru okkara nærmastu grannar, og tað sigur seg nærum sjálvt, at flogsamband eigur at vera til hesi støð, sigur Johan Mortensen.

Ikki bara oljuvinnan vindur upp á seg. Fleiri og fleiri føroyingar arbeiða innan fiskivinnuna í Noregi og Bretlandi. Og tað gongur alt ov striltið og er sera kostnaðarmikið, um sambandið millum Føroyar og umheimin og umheimin og Føroyar altíð skal ganga umvegis Danmark.

– Sjálvandi skal Atlantsflog ikki flúgva til Noreg og Bretland, um hetta slettis ikki kann forsvara seg fíggjarliga. Men eg kenni meg sannførdan um, at tað á ein ella annan hátt kann lata seg gera. Í hvussu so er eiga allir møguleikar í hesum sambandi at vera troyttir.

Johan Mortensen vísir á, at tað einans er ein stórur tími at flúgva til Bergen og tað er upp aftur styttri at flúgva til Aberdeen.



**Tað er ov kostnaðarmikið og strævið, um sambandið millum umheimin og Føroyar einans skal ganga umvegis Danmark. Johan Mortensen heldur, at Atlantsflog eigur at finna onkra loysn, so vit fáa okkurt slag av sambandi við grannalondini Noreg og Bretland.**




Sparikassin:

# Fólk hava fleiri pengar um hendi

Føroya Sparikassi kundi føra aftur 4,1 mió. kr. av framdum burturleggingum fyrra hálvár í 1997. Orsøkin sigur Føroya Sparikassi vera einfalda: Búskapurin er batnaður. Hetta sæst aftur í gjaldsevnunum hjá fólki og í hækkaðu sethúsaprísunum, sigur Føroya Sparikassi.

Fyrra hálvár í ár royndist væl hjá Føroya Sparikassa. Roknskapurin, sum kom fyrr í vikuni, vísir eitt avlop fyrra hálvár upp á 32,5 milliónir krónur. Hetta er 900.000 krónur frægari úrslit enn sama tíðarskeið 1996.

Nettorentuinntøkurnar gjørdust 71,7 mió. móti 69,5 sama tíðarskeið 1996. Úrslitið av fíggjarpostum gjørdist 75,6 mió. Hetta eru 3,7 mió. hægri enn í 1996.

## Fleiri starvsfólk

Viðskiftafólkini eru vorðin fleiri seinni árini hjá sparikassanum. Tískil er eisini virksemið munandi økt. Sparikassin sigur í skrivi, at nógv orka verður brúkt at skúla starvsfólkini, so tey til eina og hvørja tíð kunnu geva eina kappingarføra tænastu.

Tað kostar pening at skúla starvsfólkini, og manningin í Føroya Sparikassa vaks við 12 fólkum í 1996. Útreiðslurnar til starvsfólk v.m. og umsiting hækkaðu við 4,7 mió. upp í 39,6 mió.

Sparikassin kundi eisini fyrra hálvár í 1997 føra aftur framdar burturleggingar. 4,5 mió. vóru afturførdar, og sparikassin sigur orsøkina vera, at fólk tykjast hava fleiri pengar at gjalda aftur við. Sparikassin heldur búskaparstøðuna vera batnað, tí eisini sethúsaprísirnir eru hækkaðir.

## Solvensurin 35,7%

30. juni 1997 var javni Sparikassans 3,512 milliardir. Hetta er ein vøkstur upp á 173 mió. Útlánið vaks við 150 mió. Vøksturin stavar bæði í útlánum til privat og vinnulívið. Innlánini øktust við 104 mió. til 2,7 milliardir. Útlánsprosentið er 89.

Gjaldførið var 945 mió. 30. juni 1997. Eginognin er í dag 639 mió. Hetta er ein vøkstur á 50 mió. frá sama tíðarskeiði í fjør. Solvensurin er 35,7%. Lógarkravið er 8%.

Sparikassin roknar við, at úrslitið seinna hálvár verður á leið tað sama, sum úrslitið frá seinna hálvárinum í 1996.